# Suðurættin - livandi og dugnalig

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og kanska okkurt ælið, um kvøldið lot av ymsum ættum og turt. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av landsynningi og regn. Seinnapartin snarar hann í sunnan og útsynning og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi, týsdagin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 5 og 9 stig.



*Suðurættin í Tivoli*

**Suðurættin nevnist bólkur við tónleikanæmingum úr Suðuroynni. Fyri stuttum luttók bólkurin í tónleikadegi í Tivoli í Danmark og eru umrøðurnar frá avrikinum á túrinum sera góðar. Í dag verður bólkurin við í mentanarnáttini í SMS**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Vanliga finna musikkskúlanæmingar saman í bólkar at leika, so spælast kann alment. Oddur Hentze, tónleikalærari, hevur savnað næmingar sínar í bólkin, sum nevnist Suðurættin. Hetta eru næmingar úr Hovi, Famjin, Tvøroyri og Hvalba. Talan er um bæði messing- og træblástur.

### Tivoli og brúdleyp

Jens Knudsen, tónleikalærari, nevndi fyri Oddur Hentze, at hann í síni tíð í Danmark hevði tikið lut í degi í Tivoli fyri tónleikaskúlar. Her fekk Oddur hugskotið at royna at sleppa við til tiltakið, tí umframt sjálva upplivingina, so er slíkt eisini gott at halda fólki til - ein sonevnd gularót.

Og síðani fór Oddur í gongd og sambært starvsfeløgunum, sum vóru við á ferðini, so hevur tað verið stríð hjá honum at fáa hetta til veruleika og at fáa bólkin so væl fyri til ferðina. Bólkurin spældi nevniliga sera væl, skilst. Og sjálvandi krevur slík ferð eisini sítt av ferðaleiðaranum, meðan ferðalagið er langt av landi skotið.

Men sera væl gekk og tað hendi hvørki meira ella minni, enn at Suðurættin fekk viðurkenning og gávu fyri serliga klangin - føroyskt og mergjað.

Spælt varð í Tivoli á H. C. Andersenplads, har harmoniorkestur hildu til, á Gammel Torv og eisini í Føroyahúsinum. Ferðin var sama vikuskiftið, sum kongaliga brúdleypið, so nógv stákan var í danska høvuðsstaðnum og eisini í Føroyahúsinum.

### Mentanarnátt

Allar kommunurnar í Suðuroynni stuðlaðu ferðini væl og eisini Føroya Sparikassi, Føroya Banki og SMS stuðlaðu, so ferðin gjørdist veruleiki, men stríðið og undanvindin eftir gott avrik eiga Oddur og næmingar takk fyri.

Og tí vilja søgur vera við, at møguliga verður viðurkenning latin orkestri og leiðara av musikkskúlaleiðaranum í Suuroynni, Elini Nielsen, tá Suðurættin verður at hoyra í mentanarnáttini, sum verður í dag í SMS. Livst so spyrst.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 18 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 25 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 25 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1009 hPa. sunnan fyri Ísland fer í landnyrðing eystan og verður yvir Føroyum fríggjanáttina.




Lágtrýstið eystan fyri Føroyar fer í landnyrðing. Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum fer eisini í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 02/06 kl. 06⁰⁰– 03/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,6°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 02/06 kl. 06⁰⁰–03/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 15,0 mm

*Sunnudagur kl. 11.00:*

## Hátíðarguðstænasta í Gjáar kirkju

Trinitatis sunnudag í 1929 var fyrsta fullfíggjaða kirkjuvígsla í Føroyum á føroyskum máli. Tað var tá Jákup Dahl, próstur, vígdi Gjáar kirkju. Bæði vígslu-ritual, lisnir tekstir, bønir, prædika og sálmar vóru á føroyskum.

Nú sunnudagin verður hátíðarguðstænasta í Gjáar kirkju í sambandi við, at 75 ár eru liðin, síðani hon varð vígd. Hans Jacob Joensen, biskupur – og sjálvur gjáarmaður – prædikar.

### Morgunlestrar
**7.–12. juni**

***Thorben Johannesen, prestur, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 7. juni:**
nr. 19 Nú takkið Guði øll

**Týsdagin 8. juni:**
nr. 16 Tær Guð, sum ein ræður himni á

**Mikudagin 9. juni:**
nr. 342 Alheimsins tjóðir, gevið ljóð
nr. 251 Ó, Jesus, gev, títt halga orð

**Hósdagin 10. juni:**
nr. 15 Vit trúgva allir á ein Guð

**Fríggjadagin 11. juni:**
nr. 250 Tín ríkis søk, mín Jesus, skal

**Leygardagin 12. juni:**
nr. 357 Guð, tú tín akur má signa og verja
nr. 359 Hvør tann, sum trýr og doyptur er

## VESTFALLSKYRRINDI

3. juni: Fullmáni/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. juni | 08.17 | 20.42 | 07.17 | 19.42 | 07.32 | 19.57 | 10.17 | 22.42 | 11.17 | 23.42 | 06.32 | 18.57 | 05.32 | 17.57 | 08.32 | 20.57 | 09.32 | 21.57 | 08.02 | 20.27 | 09.17 | 21.42 |
| 5. juni | 09.21 | 21.46 | 08.21 | 20.46 | 08.36 | 21.01 | 11.21 | 23.46 | — | 12.21 | 07.36 | 20.01 | 06.36 | 19.01 | 09.36 | 22.01 | 10.36 | 23.01 | 09.06 | 21.31 | 10.21 | 22.46 |
| 6. juni | 10.24 | 22.49 | 09.24 | 21.49 | 09.39 | 22.04 | — | 12.24 | 00.46 | 13.24 | 08.39 | 21.04 | 07.39 | 20.04 | 10.39 | 23.04 | 11.39 | — | 10.09 | 22.34 | 11.24 | 23.49 |
| 7. juni | 11.22 | 23.51 | 10.22 | 22.51 | 10.37 | 23.06 | 00.49 | 13.22 | 01.49 | 14.22 | 09.37 | 22.06 | 08.37 | 21.06 | 11.37 | — | 00.04 | 12.37 | 11.07 | 23.36 | — | 12.22 |

5 707265 100050 >